# Brøndby siglir sín egna sjógv

**Í Noregi verður venjarin hjá FCK nevndur sum møguligur nýggjur landsliðsvenjari, og FCK formaðurin ásannar, at felagið hevur tosað við norska fótbóltssambandið**

DANMARK
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Vónbrotið var stórt í FCK, tá tað hóast greiða yvirvág og hópin av møguleikum ikki eydnaðist at halda fast um leiðsluna móti AGF*

Tað gongur upp á stás í Brøndby. Sunnukvøldið varð Brøndby venjarin, Michael Laudrup, kosin ársins venjari í Danmark. Tað var ikki so undarligt. Brøndby vann fyrr í summar steypakappingina, og í landskappingini vórðu teir næstbest. Í løtuni eru teir oddalið í landskappingini. FCK hevur verið mett sum mest sannlíki avbjóðarin, men úrslitini í vikuskiftinum styrktu avgjørt ikki um sannleiksvirðið í hesi metingini.

Sunnudagin hevði FCK vitjan av AGF. Århus felagið tykist hava fingið nýggjan íblástur og er hamskifti, síðani teir skiftu venjara. Hesa ferð var tað tó FCK, sum leingi hevði nógv mest spæl og nógv teir flestu møguleikarnar. Álvaro Santos stútaði til 1–0 longu í 6. minutti, eftir at Peter Nielsen hevði sent fríspark innfyri. Lítla løtu seinni sendi miðvallarin Hjalte Bo Nørregaard í innaru síðuna av stólpanum, men tað íðraðu teir seg ikki so ógvuliga nógv um, tí spælbýtið boðaði frá, at FCK mundi fara at fáa bæði eitt og fleiri mál afturat. Men soleiðis tørnaði tað ikki út.

Eftir steðgin vóru gestirnir meira framfýsnir, og tíggju minuttir undan leikloki gjøgdist tað heilt friðarligt millum teir næstan átjan túsund áskoðararnar. Leon Andreasen sendi úr 31 metrum fríspark beinleiðis í kassan, og harvið hevði FCK mist tvey sera týdningarmikil stig.

Longu leygardagin syrgdi Brøndby við 3–1 sigri í Herfølge fyri, at teir hildu kósina ímóti DM gullinum. Sigurin var tann sjeyndi á rað á útivølli hjá felagnum hjá Jón Róa Jacobsen.

Esbjerg var oddalið undan vitjanini í Farum, men eftir 2–0 tapið eru teir trý stig aftanfyri Brøndby, meðan fjarstøðan hjá FCK og fram til oddaliðið øktist til níggju stig.

Í botninum vann AB 2–1 í Valby ímóti Frem. Hetta var fyrsti sigurin hjá AB í tólv dystum. AB er kortini framvegis botnlið. Seinast teir vunnu var 31. august. Mótstøðuliðið ta ferðina var júst Frem.

Í Aalborg togaði heimaliðið seg eitt vet nærri heiðursmerkja plássunum. AaB legði syndarliga lítið sannførandi fyri í summar, men nú hevur fleiri ferðir gingið sum eftir ánni, og AaB er nummar seks. Mótstøðuliðið hesa ferð, OB, er framvegis á fimta plássinum. AaB vann 3–1, og munurin fram til fimta plássið minkaði av álvara. Viðhaldsfólkini hjá OB, sum fylgdu við úr Odense vóru ikki øll í eins góðum hýri, eftir at teirra lið hevði tapt. Løgreglan kendi seg noydda at leggja upp í, og fleiri vórðu løgd í handjørn.

Í Ikast endaði tað málleyst, tá ið Viborg vitjaði FC Midtjylland. Gestirnir vóru leingi leikliga omaná, og teir á heimaliðnum eru vónbrotnir av, at fjórða plássið, sum teir undan kappingarbyrjan høvdu sett nøsina eftir, nú er sjey stig burtur.

Hósdagin skulu bæði Brøndby og FCK royna seg í UEFA Cup. Brøndby verður mett at hava møguleika á heimavølli, meðan tað sær svartari út hjá FCK, sum suðuri á Mallorca skal royna at vinna 2–1 tapið á heimavølli aftur.

**Backe tos í Noregi**

Todi Jónsson bant frið frá venjing í síðstu viku. Møguliga skal hann venja eitt sindur í hesi vikuni. Tað er kortini heilt greitt, at hann skal ikki við FCK niður í Miðalhavið.

Saman við øllum øðrum hevur Todi møguleika í donsku og norsku pressuni at lesa, at venjarin hjá honum, Hans Backe, er upp á tal at gerast norskur landsliðsvenjari.

Í størsta norska blaðnum, VG, siga teir seg vita, at norska fótbóltssambandið hevur følt seg fyri í FCK. Venjarin vil einki siga, tí prinsipielt leggur hann ikki í at spæla við í spekulatiónum í pressuni. FCK bossurin, Flemming Østergaard, sigur seg heldur ikki hava nakrar viðmerkingar. Men hann vil fegin spæla við í pressuni og váttar, at tað hevur verið samband millum FCK og norska fótbóltssambandið.

## Partick framvegis sigursleysir

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað gongur framvegis av skriðuni hjá Partick Thistle. Leygardagin høvdu teir vitjan av Kilmarnock, sum fór avstað aftur við øllum stigunum. Úrslitið var 4–2 til útiliðið, og harvið eigur Partick Thistle framvegis fyrsta sigurin til góða, nú kappingarárið skjótt fer at verða hálvrunnið.

Jákup Mikkelsen var í Klaksvík eina viku, tá ið skotska kappingin hevði fríviku, tí Skotland stríddist við Holland um eitt pláss í EM endaspælinum, sum verður í Portugal næsta summar. Jákup Mikkelsen er aftur í Skotlandi nú, men leygardagin noyddist hann enn eina ferð at sita á beinkinum.

## Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Esbjerg | 18 | 12 | - | 3 | - | 3 | 32 | 16 | 16 | 39 |
| 2 Brøndby (S) | 18 | 13 | - | 3 | - | 2 | 32 | 12 | 20 | 42 |
| 3 FCK (M) | 18 | 9 | - | 6 | - | 3 | 26 | 15 | 11 | 33 |
| 4 OB | 18 | 9 | - | 4 | - | 5 | 36 | 26 | 10 | 31 |
| 5 AaB | 18 | 8 | - | 5 | - | 5 | 27 | 22 | 5 | 29 |
| 6 FCM | 18 | 7 | - | 3 | - | 8 | 29 | 25 | 4 | 24 |
| 7 AGF | 18 | 7 | - | 2 | - | 9 | 27 | 37 | -10 | 23 |
| 8 Viborg | 18 | 5 | - | 6 | - | 7 | 30 | 27 | 3 | 21 |
| 9 Herfølge | 18 | 4 | - | 5 | - | 9 | 18 | 26 | -8 | 17 |
| 10 FC Nordsj. | 18 | 4 | - | 6 | - | 8 | 23 | 33 | -10 | 18 |
| 11 Frem | 18 | 4 | - | 2 | - | 12 | 18 | 34 | -16 | 14 |
| 12 AB | 18 | 3 | - | 1 | - | 14 | 13 | 38 | -25 | 10 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

## Skotska Premier League

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Celtic | 13 | 12 | - | 1 | - | 0 | 43 | 4 | 39 | 37 |
| 2 Rangers | 13 | 10 | - | 2 | - | 1 | 36 | 11 | 25 | 32 |
| 3 Hearts | 13 | 8 | - | 2 | - | 3 | 21 | 15 | 6 | 26 |
| 4 Motherwell | 12 | 5 | - | 4 | - | 3 | 15 | 13 | 2 | 19 |
| 5 Dunfermline | 12 | 5 | - | 3 | - | 4 | 12 | 15 | -3 | 18 |
| 6 Livingston | 13 | 4 | - | 5 | - | 4 | 14 | 14 | 0 | 17 |
| 7 Dundee | 13 | 4 | - | 4 | - | 5 | 14 | 15 | -1 | 16 |
| 8 Hibernian | 13 | 4 | - | 4 | - | 5 | 14 | 19 | -5 | 16 |
| 9 Kilmarnock | 13 | 4 | - | 2 | - | 7 | 18 | 30 | -12 | 14 |
| 10 Dundee Utd. | 13 | 2 | - | 4 | - | 7 | 10 | 26 | -16 | 10 |
| 11 Aberdeen | 13 | 2 | - | 1 | - | 10 | 9 | 27 | -18 | 7 |
| 12 Partick | 13 | 0 | - | 2 | - | 11 | 11 | 28 | -17 | 2 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)

H71-KÍF 17-17 (9-7):

# Javnleikur í botninum

**Í einum óvanliga málfátækum dysti býttu hoyvíkingar og kollfirðingar stigini sínamillum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var møguleikin hjá botninum at sleppa leysur av sama, tá H71 og KÍF dystaðust í Hoyvíkarhøllini sunnudagin. Bert tvey stig høvdu liðini hvør í sínum lagi fingið til høldar undan hesum, og vóru tey tí javn í botninum. Og tað eru tey framvegis, kann hóskandi leggjast afturat.

**Eingin Oros**

Hóast støðuna niðarliga á talvuni, so hava bæði liðini megna at skotið hópin av málum higartil í kappingini, men dysturin sunnudagin var eitt stórt undantak í so máta.

Hjá gestunum var orsøkin serliga tann, at hvørki Damir Oros ella Regin Petersen vóru tøkir hendan dagin, og uttan tveir av bestu álopsmonnunum á liðnum skuldi tað alla tíðina gerast tungt.

Hoyvíkingarnir vóru nakað betri fyri í so máta, og leingi var eisini líkt til, at teir skuldu fáa stigini til høldar. Eitt skifti í seinna hálvleiki høvdu teir eina 15-10 leiðslu, men so tóku kollfirðingar veruliga á. Spakuliga ótu teir seg alt meira inn á hovyíkingar, og tó at H71 royndi at svara aftur, so var hetta til fánýtis, tí leysir av mótstøðuni sluppu teir ikki.

Heilt til fánýtis var stríðið hjá H71 tó ikki. Javnleikurin merkir nevniliga, at teir fingu eitt stig afturat við sær í endaspælið, og sum støðan er í løtuni, so telir hetta stigið eisini fult.

Tað ger tað so eisini hjá KÍF, og nú tykist støðan eitt sindur bjartari hja báðum pørtum. Næsta mótstøðuliðið er heldur ikki meira enn tvey stig burturi, og so er spurningurin, hvørt liðini megna at leggja meira afturat úrtøkuni, tá tey komandi vikuskiftið spæla ímóti ávíkavist Kyndli og Neistanum.

**Dysturin í tølum**

**H71-KÍF 17-17 (9-7)**

**Málskjúttar**

**H71:** Halgri Dahl Olesen 8, Tróndur Vatnhamar 3, Niels Viggo Niclasen 3, Esbern Patursson 2, Johnny Durhuus 1

**KÍF:** Gert Hansen 7, Arnbjørn Hansen 4, Jónálvur Johannesen 2, Teitur Joensen 2(1), Petur Martin Poulsen 2

**Brotskøst:** H71 1, KÍF 3

**Útvísingar:** H71 9, KÍF 8

**Diskvalifikatión:** H71 1 (3X2 minuttir)

**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Uni Wardum.



# Kaggin framvegis á odda

**– men nú koma klaksvíkingar spelandi**

BILLARD
*Billardsambandið*



*Liðið hjá Klaksvíkar Klubba gjørdi veruliga vart við seg um vikuskiftið, tá teir vunnu 18-0 á Kagganum 2*

*Mynd Jan Müller*

Kaggin 1 vann 10-8 á Havnar Klubba seinasta vikuskiftið og hevur harvið tryggjað sær framhaldandi oddaplássið í billardkappingini. Men tað var liðið hjá Klaksvíkar Klubba, sum gjørdi veruliga vart við seg í kappingini. Teir tríggir billardmusketerarnir úr Klaksvík, Krisjan Sune, Ólavur og Sonhard niðurspældu Kagga 2 liðið við at vinna 18-0. Hóast kaggamenn í einstøkum dystum bert vóru fá eygu frá at vinna, so vóru klaksvíkingar suverenir og hava teir við hesum stórsigrinum í sínum fyrsta dysti í ár víst, at teir verða ikki lættir at syfta. Hóast Havnar Klubbi hevur styrkt sítt lið við landsins besta spælara, Henning Petersen, sum hevur størsta meðaltalið í løtuni, sum verður ringt at vinna á einum so homogenum og jøvnum liði, sum tí hjá klaksvíkingum. Men allar súðir eru langt frá syftar. Spónurin er júst settur í billardgreytin. Kaggin 1 hevur 24 stig fyri tvey umfør, Klaksvíkar Klubbi hevur 18 stig fyri eitt umfar. Havnar Klubbi er á tirðja plássi eisini við 18 stigum, síðani kemur Tvøroyrar Klubbi við 8 stigum og Kaggi 2 við 4 stigum. Klaksvík og Tvøroyri hava bert spælt eitt umfar.

Um einstøku úrslitini er at siga, at teir báðir, Krisjan Sune Høgnesen og Henning Petersen, liggja rættiliga javnir og hava eitt meðaltal, sum liggur langt frammanfyri hinar spælararnar. Hetta kundi bent á, at vit í ár fara at fáa eina staklingafinalu millum teir báðar.

# Taptu fyri oddinum

Føroyski Heini Hanusarson var aftur hetta vikuskiftið í dysti fyri felag sítt, Team Midtsjælland. Mótstøðuliðið hesaferð var GOG, sum í løtuni heldur til ovast á donsku hodbóltstindunum, so tað varð alla tíðina roknað við, at talan skuldi verða um trupla uppgávu hjá Hejna og teimum.

Úrslitið av dystinum gjørdist eisini ein greiður sigur til geistirnar, og veruligur spenningur var sjáldan í dystinum. Men sæð úr føroyskum sjónarhorni, so er tó hugaligt at staðfesta, at Heini tykist gera alt meira um seg á liðnum. Hesa ferð skeyt hann fimm av málunum hjá TMS í 26-38 tapinum, og megnar hann at halda fast um hesar taktirnar, so verður tað kanska ikki so leingi, áðrenn hann enn einaferð kann vera maðurin aftan fyri okkurt stiggevandi málið hjá liðnum.

Team Midtsjælland er í løtuni á 10. plássinum í bestu donsku deildini.

**- jm**

## Billardstøður

**1. deild**

| | Dystir | Eygu | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 Kaggin 1 | 2 | 6750 | 18,75 | 24 |
| 2 Havnar Klubbi | 2 | 7138 | 19,83 | 18 |
| 3 Klaksvíkar Billardfelag | 1 | 4260 | 23,67 | 18 |
| 4 Tvøroyrar Billardfelag | 1 | 3088 | 17,16 | 8 |
| 5 Kaggin 2 | 2 | 5584 | 15,51 | 4 |

**Komandi umfar:**

**2. deild**

| | Dystir | Eygu | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 Havnar Klubbi | 1 | 1588 | 8,82 | 11 |
| 2 Klaksvíkar Billardfelag1 | 1 | 1644 | 9,13 | 10 |
| 3 Klaksvíkar Billardfelag2 | 1 | 1652 | 9,18 | 8 |
| 4 Kaggin | 1 | 1462 | 8,12 | 7 |
| 5 Tvøroyrar Billardfelag | 0 | 0 | 0,00 | 0 |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 178 | 133 | 45 | 11 |
| 2 VÍF | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 180 | 153 | 27 | 11 |
| 3 VB | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 163 | 127 | 36 | 10 |
| 4 StÍF | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 174 | 166 | 8 | 9 |
| 5 Neistin | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 190 | 166 | 24 | 7 |
| 6 Søljan | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 136 | 196 | -60 | 2 |
| 7 Kyndil | 7 | 0 | - | 0 | - | 7 | 108 | 188 | -80 | 0 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 171 | 170 | 1 | 9 |
| 2 Neistin | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 173 | 150 | 23 | 8 |
| 3 StÍF | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 151 | 142 | 9 | 8 |
| 4 VÍF | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 154 | 147 | 7 | 5 |
| 5 H71 | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 143 | 158 | -15 | 3 |
| 6 KÍF | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 142 | 167 | -25 | 3 |

## Danska TDC-ligan

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GOG | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 300 | 221 | 79 | 16 |
| 2 AaB | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 267 | 217 | 50 | 16 |
| 3 KIF | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 276 | 234 | 42 | 16 |
| 4 Skjern | 9 | 6 | - | 0 | - | 3 | 255 | 223 | 32 | 12 |
| 5 Tvis | 9 | 6 | - | 0 | - | 3 | 210 | 204 | 6 | 12 |
| 6 Bjerringbro | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 180 | 174 | 6 | 9 |
| 7 Århus GF | 9 | 4 | - | 0 | - | 5 | 281 | 278 | 3 | 8 |
| 8 Fredericia | 9 | 4 | - | 0 | - | 5 | 241 | 254 | -13 | 8 |
| 9 Ajax | 9 | 3 | - | 0 | - | 6 | 221 | 238 | -17 | 6 |
| 10 TMS | 9 | 3 | - | 0 | - | 6 | 188 | 233 | -45 | 6 |
| 11 FCK | 9 | 2 | - | 1 | - | 6 | 225 | 234 | -9 | 5 |
| 12 Silkeb.-Voel | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 220 | 252 | -32 | 4 |
| 13 Helsinge | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 230 | 263 | -33 | 4 |
| 14 Otterup | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 186 | 255 | -69 | 4 |

Føroyskir leikarar: Heini Hanusarson (TMS)

i
Sosialurin

Lesið
Sosialin

## Máltindarnir

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 69 (15) |
| Ioana Rápa | VÍF | 47 (11) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 44 (16) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 41 (11) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 39 (7) |
| Milica Ergic | StÍF | 39 (7) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 37 (5) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 35 |
| Katarina Stepanovic | Stjørnan | 34 (9) |
| Gurið Mortensen | VB | 31 (6) |
| Alina Olaru | StÍF | 30 (9) |
| Rannvá Augustinussen | VB | 29 |
| Irina Rodevici | VÍF | 29 |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 29 (7) |
| Beinta Joensen | StÍF | 27 |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| Blagoje Buha | Neistin | 49 (14) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 48 (6) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 45 (21) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 43 (2) |
| Damir Oros | KÍF | 36 (13) |
| Ingi Olsen | VÍF | 33 (13) |
| Áki Mørk | Neistin | 32 (3) |
| Sámal Joensen | VÍF | 32 (4) |
| Henrik Gerster | H71 | 31 (10) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 30 (4) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 28 |
| Alexandur Johansen | StÍF | 28 (14) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 27 |
| Høgni Klein | Kyndil | 26 |
| Mihai Marinescu | StÍF | 25 |